# lskapin



*Írsku stjørnunar sluppu sanniliga til arbeiðis. Her er tað Damian Duff, sum noyðist at ásanna, at eisini hesaferð var Fróði omaná. Claus tykist vera eitt sindur í iva um, hvat nú skal henda*

eisini upp fyri føroyskum spæli hinvegin. Megnaðu okkara at spæla seg framvið fyrstu írsku ketuni, so bleiv aloftast gott pláss at spæla. Okkara fingu bæði pláss og tíð at spæla sítt spæl, og tí vórðu írar í nógv størri mun enn ætlað noyddir at renna heimeftir vøllinum.

Tað hoyrir tó eisini við til hesa søguna, at orsøkin til, at okkara yvir høvur komu somikið langt niðan, at pláss varð til at spæla, var føroyskt dirvi og frekleiki. Okkara menn tordu at spæla bóltin niðan á miðvøllin. Einstaka ferðirnar enntá í tøttum kombinatiónum niðan eftir vøllinum, og tað høvdu írar í øllum førum ikki sæð fyri bara hálvum ári síðani.

## Galskapurin hvarv

Tí var tað við eini góðari kenslu, at farið varð til hálvleiks. Írsku tíðindamenninir tóktust heldur ikki verea heilt álvuligir í steðginum. Høvdu ivaleyst roknað við, at talan skuldi gerast um ein hampuliga tryggan sigur, hóast venjarin hevði tosað um nakað annað.

Og tí bíðaðu flestu føroyingarnir við góðum treysti í regninum til seinastu trý korterini.

Men tað stóð skjótt greitt, at hesi fóru ikki at gerast eins hugalig, sum fyrri hálvleikur var. Tað tóktist, sum var nakað av galskapinum á liðnum burtur. Sjálvandi vóru menn framvegis uppsettir, og vit fingu eisini eitt hornaspark alt fyri eitt, sum Rógvi tíverri stútaði uppum.

Men tað var, sum var hetta nú meira ein vanligur dystur hjá føroyingunum. Ikki ein av hesum, har hvør maður spælir yvir evni, men heldur ein, har menninir spældu upp til sítt besta. Um tað kann sigast so.

Og tá so er, so er trupult hjá okkum at standa okkum á altjóða vøllinum. Írar revsaðu eisini okkum alt fyri eitt. Ein bóltur varð stungin inn um Atla Danielsen, og tá Jákup nølaði tann avgerandi brotpartin av einum sekundi, varð Stephen Elliot fyrr á bóltinum, og so rendi málverjan írska áleyparan um koll. Nakað annað er so tað, at bólturin neyvan var í spælbarari frástøðu, men hevði fari til málspark, óansæð um maðurin fór um koll ella ikki. Men í slíkum støðum verður aloftast brískslað fyri brotssparki kortini, og tað var júst tað, sum bulgarski dómarin gjørdi.

Jákup hevði hondina á, men hann fekk kortini ikki forðað Ian Harte í at skora, og so var Írland á sigurskós.

Og tað gingu heldur ikki meira enn sjey minuttir, so var aftur galið. Hesa ferð var málið av hesum slagnum, sum kann koma fyri, um okkara menn søkka ov langt aftur. Spælt var í og kring føroyska brotsteigin, og tá Kevin Kilbane so meddaði til, var Óli Johannesen óheppin at avrætta skotið, sum soleiðis fullkomuliga snýtti Jákup Mikkelsen.

## Góð kensla

Talan kundi eisini verið um enn tryggari sigur, var tað ikki fyri eina frálíka dupultbjarging frá Jákupi, men eftir hetta tóktist tað, sum komu okkara betri við. Írar tóku seg eisini nakað aftur á vøllin, nú teir høvdu stigini, sum komið varð eftir, og meðan føroysku og írsku áskoðararnir kappaðust um, hvør kundi syngja harðast, otaðu okkara menn so aftur fram í dystin.

Talan gjørdist kanska ikki um teir heilt stóru møguleikarnar, men í løtum varð talan nú um eitt gott og væl skipað føroyskt trýst. Vøllurin varð gjørdur breiður, bakkarnir komu upp við, og so restaði bara høvdið hjá Rógva ella onkrum øðrum, tá mongu innleggini vórðu send innfyri. Hetta hendi tó ikki, og nærmast við mundu føroyingarnir vera, tá Heðin á Lakjuni við annars kalda høgra beininum langaði til úr 20 metrum, men Shay Given í málinum fekk tó vart fyri teirri royndini eisini.

Góði endaspurturin hjálpti eisini til við at halda fast um góðu kensluna hjá áskoðarunum av dystinum. Okkara menn prógvaðu, at teir væl kunnu vera við á hesum støðinum. Og teir prógvaðu eisini, at tosið um vantandi framgongd og kanska eisini beinleiðis afturgongd ikki hevur hald í veruleikanum.

Men veruleikin er eisini, at skulu Føroyar standa seg á hesum støðinum, so krevur tað, at allir mans eru heilt á tindinum til hvørja einastu uppgávu. Og at teir verða standandi á tindinum í samfullar 90 minuttir. Mótstøðan er aloftast av slíkum slag, at verður takið slept eina lítla løtu, og sita tacklingarnar bara hart heldur enn knallhart í lítla løtu. So verða vit revsaðir. Snøgt sagt, so skal galskapur til.

## FAKTA UM DYSTIN

**Føroyar-Írland**
**HM-undankappingardystur**
**8. juni 2005 á Tórsvølli**
5.180 áskoðarar (Tað var í øllum førum almenna talið, hóast 4.000 helst er eitt meira realistiskt boð)
**Dómarabólkur úr Bulgaria:** Anton GENOV, Nikolay ANGELOW, Nikolay PETROV, Kostadin KOSTADINOV.
**FIFA Umboðsmaður:** Dag VESTLUND (NOR)
**FIFA Eygleiðari:** Jean Claude JOURQUIN (BEL)
**Føroyar:**
1. Jákup MIKKELSEN (B36) - 4. Johan Byrial HANSEN (Horsens BK), 13. Óli JOHANNESEN (liðf.) (TB), 3. Atli DANIELSEN (KÍ), 2. Súni OLSEN (GÍ) - 8. Julian JOHNSSON (B68), 7. Fróði BENJAMINSEN (B36) (Jákup á BORG (HB), 80.), 7. Rógvi JACOBSEN (KR), Heðin á LAKJUNI (KÍ) - Claus Bech JØRGENSEN (Coventry CFC) (Tór-Ingar AKSELSEN (HB), 80.), 11. Andrew av FLØTUM (Fremad Amager) (Christian Høgni JACOBSEN (NSÍ), 59.)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** Mortan úr HØRG (VB), Jónhard FREDERIKSBERG (Skála), Jens Martin KNUDSEN (NSÍ), Ingi HØJSTED (B36)
**Gult kort:** Heðin á LAKJUNI, 16., Fróði BENJAMINSEN, 36., Jákup MIKKELSEN, 50.
**Venjari:** Henrik LARSEN, **Hjálparvenjari:** Jógvan Martin OLSEN, **Fysioterapeutur:** Øssur STEINHÓLM, **Lækni:** John Reid BJARTALÍÐ, **Liðleiðari:** Birgir HANSEN
**Írland:**
1. Shay GIVEN (Newcastle United) - 2. Stephen CARR (Newcastle United), 5. John O'SHEA (Manchester United), 4. Kenneth CUNNINGHAM (Birmingham), 3. Ian HARTE (LEVANTE UD) - 7. Andy REID (Tottenham Hotspur), 6. Roy KEANE (liðf.) (Mancheter United), 8. Kevin KILBANE (Everton) - 10. Clinton MORRISON (Birmingham) 17. (Gary DOHERTY (Norwich City), 80.), 9. Stephen ELLIOT (Sunderland), 11. Damian DUFF (Chelsea)
**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Patrick McCARTHY (Leicester City), 13. Matthew HOLLAND (Charlton Athletic), 14. Steven REID (Blackburn Rovers), 15. Graham KAVANAGH (Wigan Atletic), 16. Patrick KENNY (Sheffield United), 18. Alan LEE (Cardiff City).
**Gult kort:** Roy KEANE, 8.
**Venjari:** Brian KERR







*næstan ikki ein fingur setast á samlaða føroyska avrikið*